UTTANRÍKISRÁÐIÐ
Ministry of Foreign Affairs

**Leiðreglur um tilbúgving til útflutningsvinnuna**

1.

Tá bráðfeingis trupulleikar stinga seg upp í útflutningsvinnuni, eigur vinnan at boða Uttanríkisráðnum frá á tlf. +298 30 61 15 ella um t-post skipanina á tilbugving@mfa.fo

2.

Endamálið við tilbúgvingini er at veita útflutningsvinnuni alla neyðuga hjálp og stuðul, tá ið bráðfeingis trupulleikar koma í. Uppgávan hjá tilbúgvingini er at loysa íkomnar trupulleikar, ella at lýsa og koma við tilmæli til rætta myndugleika um, hvussu málið eigur at verða loyst.

3.

At røkja hesa uppgávu, velja aðalstjórarnir fimm fólk. Útflutningstilbúgvingin verður skipað við leiðslu úr Uttanríkisráðnum og umboðum frá Fíggjarmálaráðnum, Fiskimálaráðnum, Vinnumálaráðnum og Vinnuhúsinum. Harumframt verða viðkomandi partar, sum varða av ella hava fakliga vitan um evnið, eisini partar av Útflutningstilbúgvingini.

4.

Uttanríkisráðið hevur ábyrgd av at kalla partarnar saman, so skjótt áheitan er komin um bráðfeingis trupulleikar, ella varnast verður, at trupulleikar fara at stinga seg upp í útflutningsvinnuni.

5.

Uttanríkisráðið kunnar um Útflutningstilbúgvingina og leiðreglurnar eru at finna á heimasíðuni hjá Uttanríkisráðnum, Fiskimálaráðnum, Vinnumálaráðnum og hjá Vinnuhúsinum.

6.

Henda mannagongd kemur í gildi 1. mars 2010 og verður endurskoðað, tá ið tvey ár eru liðin.

Uttanríkisráðið 15. februar 2010

Jørgen Niclasen
uttanríkisráðharri

/

Herluf Sigvaldsson
aðalstjóri

Tinganes · FO-100 Tórshavn · Faroes
Tel: +298 306100 · Fax: +298 306105 · e-mail: mfa@mfa.fo · www.mfa.fo